RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Útbjóðingarskriv

## Leitað verður eftir einum veitara til innrættan og veitan av innbúgvi til nýggja handilin hjá Rúsdrekkasølu Landsins á Óðinshædd í Tórshavn.

## Um Rúsdrekkasølu Landsins

Rúsdrekkasøla Landsins er ein fyritøka undir Tilfeingis og vinnumálaráðnum, og virkar eftir greiðum málum við støði í rúsdrekkalógini. Málið er bæði at virka fyri at veita eina so góða tænastu sum gjørligt og at tálma nýtsluni, samsvarandi ynskinum hjá almenna eigaranum. Vit eru umleið 60 starvsfólk við goymslu, høvuðssæti og handli í Tórshavn umframt 7 handlum kring landið. Vit leggja dent á fakliga menning, góðar arbeiðsumstøður og trivnað hjá starvsfólkunum.

Rúsdrekkasøla Landsins er ein fyritøka, ið virkar á vinnuligum grundarlagi. Hetta merkir, at fyritøkan skal rekast professionelt og effektivt, virka á sunnum fíggjarligum grundarlagi har dentur verður lagdur á góða vegleiðing og tænastu. Hetta mál skal røkkast soleiðis, at nøgdirnar av seldum rúsdrekka ikki økjast. Í staðin skulu viðskiftafólkini eggjast til at velja dygd fram um nøgd. Uppliving og sansing skulu setast fram um rús og nøgd. Eisini skal fyritøkan rekast soleiðis, at alt tilfeingi og fæ stovnsins verður gagnnýtt til fulnar.

## Okkum tørvar

Fyri nýggja handilin hjá Rúsdrekkasølu Landsins á Óðinshædd, sum er verður uml. 600 m2, hevur tað týdning, at handilin í allar mátar hevur somu eyðkenni, sum dygdargóðir serhandlar, við greiðum stíli, nýtímans og nýhugsandi sniðgeving, ið sameinir burðardygd og estetetik, sum hóska til okkara handilshugtak og framúr góða kundatænastu. Virkisføri skal vera funktionelt og effektivt og handilin praktiskur og funktionellur við skynsomum arbeiðsgongdum (workflow), har tað er pláss fyri arbeiðsvognum á gólvinum, ímeðan onnur kunda avgreiðsla og vegleiðing fer fram. Góð vegleiðing skal verða í handlinum, við skelting og kanska skermum.

Handilsinnbúgvið skal kunna tillagast vøruni og lættliga flytast og gerðast um til tiltøk o.a. Tilfarið skal verða av góðari góðsku, burðardygt, slitsterkt, lætt at vaska og at halda við líka?

Eisini skal dentur leggjast á at minka um blindvinklar, soleiðis at kundar og starvsfólk eru sjónlig, fyri at tryggja bestu hjálp og ráðgeving, eins og vit tryggja okkum at alt fer rætt fram, í mun til stuldur og ósømiligan atburð. (Okkara KT deild setur upp sjónbandaupptøkuól)

## Tilgongd

Vit leggja dent á, at veitarin skipar tilgongdina, sum eitt samstarv við leiðsluna í Rúsdrekkasølu Landsins, heldur enn at øll viðurskifti verða løgd fast frá byrjan. Hetta tí tað er ringt at lýsa allar uppgávurnar neyvt frá byrjan, sum veitarin verður partur av.

Rúmið verður gjørt soleiðis, at veggir, gólv, loft og grundljós eru basisk (white box), tað vil siga, at veggir verða spartlaðir og málaðir ljósir, gólvið er planerað og lenoleum lagt á. Loftið er málað svart og ljós-armaturir verða grundljós (við dimmara). Svartar ljóðdoyvandi plátur verða eisini hongdar upp undir loftið. Vaskirúm og vesi, sum eru á tekningini í handlinum, eru liðugtgjørd. Onki skal gerðast við felagsinngongdina og onki skal gerðast við goymslu og starvsfólkarúm aftast í hølinum. Sí tekning. *(Bilag 1.1 handilshøli-2.dwg og Bilag 1.2 Handilshøli-broytt5jan2026.pdf*

## Krøv og uppgávur

**1. Útbúgving og royndir**

Ráðgevar og sniðgevar skulu hava í minnsta lagi 2 ára skjalprógvaða viðkomandi útbúgving. Veitarin skal hava førleikar og royndir frá líknandi verkætlanum og kunna vísa til dømir frá líknandi uppgávum.

**2. Plantegning, rúmútkast, sniðgeving og 3D visualisering**

Plantekning/ar skula hava uppskot har inn- og útgongd skal verða og skula týðiliga vísa hvussu kundastreymurin er í handlinum. Pláss skal verða í handlinum til serlig øki, eitt nú stað til ráðgeving, vørutorg (fokusvøru/árstíðir vm) og stað/støð til tiltøk. Planteknigin skal verða við veggreolum, hillum og innbúgvi annars og býtt upp eftir vørusløgum (planogrammi). *(Bilag 1.3 voruslog)*

Uppskotið skal tryggja best møguligu rúmumsiting (space management), sum gagnar effektiva arbeiðsgongd, soleiðis at mest fæst burturúr bæði praktiskum arbeiðsgongdum og skynsomum arbeiðsumstøðum hjá okkara starvsfólki frá bakhølunum, goymsluni og í sjálvum handlinum. (samsvara við sølutøl/yvir tíð) Veitarin skal hava møguleika at framleiða 3D visualiseringar av handlinum í tilgongdini, sum vísur innbúgv, ljósseting og skelting v.m. soleiðis, at lidna úrslitið ímyndar handilin so væl sum gjørligt

**3. Innbúgv**

Veggreolir og hillar skula verða fleksiblar, í mun til vørusløg og støðd á vøru. Borð og diskar, sum standa úti á gólvinum í handlinum, skula vera fleksiblar, soleiðis at tað er lætt at flyta frá einum staðið til annað. Kassar skula virka væl í meldurtíð. Kassarnir skula hóska til restina av handlinum. (okkara KT deild setur upp kassatól, sum vit eiga) Bíðirøðin skal verða greið og

týðilig til skjóta og skynsama avgreiðslu fyri kundar og fyri starvsfólk. Alt innbúgvið skal verða slitsterkt, lætt at vaska og halda við líka.

***NB!*** *2 standard veggjareolir við 2 modulum og 10 veggjareolir við 3 modulum úr eikitræ, sum vera nýttar í handlinum í dag, skulu brúkast aftur og passa inn saman við heildini. Eisini eru vit áhugaði og opin fyri, at annað innbúgv kann vera endurnýtt. (Bilag 2.1 Eikireol og Bilag 2.2 Eikireol)*

**4. Punktljós/spottar og prýðisljós**

Ljós skal bæði verða til leiðbeining og ljós skal verða so at vøran sæst væl. Starvsfólk skula hava gott arbeiðsljós har tað er neyðugt. Umframt tað, skal ljósseting skapa eina vakra heildarmynd til sniðgevingina á økjum, sum vørutorg, stað til ráðgeving og stað/støð til tiltøk, vm. Ljós/spottar skulu verða LED og kunnu snarast eftir tørvi. Grundljós (armaturir) eru uppsett.

***NB!*** *65 LED spottar á skinnarum, eru í handlinum og skula endurnýtast. (Bilag 3: spottar)*

**5. Skelting og evt. skíggjar**

Skelting skal verða til at vegleiða kundunum í handlinum, so lætt er at finna veg og vøru. Eisini kunnu skíggjar hangast upp til upplýsing um tiltøk, vøruúrvæl, hugskot til matsamanseting eins og upplýsing um heilsuvandar.

**6. Moodboard**

Moodboard skal framleiðast og vísa gjølla stíl og stemning við frágreiðing um litir, tilfarið, innbúgvi og ljóskeldum vm.

**7. Tíðarætlan, uppsetan og avhendan**

Alt innbúgvið, kassar, ljós, evt skíggjar og skelti, skula setast upp, so klárt er at vaska og seta vøru inn. (eisini endurnýttar eikireolir, spottar og annað, sum kan endurnýtast úr núverðandi handli) Vask og flytan av vøru, endurnýttum innbúgvi, og burturbeinan av pakkitilfari, er arbeiði hjá Rúsdrekkasølu Landsins, eins og at fylla vøru upp eftir planogrammi, í samstarvi við veitaran.

Handilin skal verða klárur at lata upp mikudagin ~~**1. juli 2026**~~**. (miða ímóti einari viku undan ólavsøku 2026. tvs. mánadagin 20. juli 2026)**

Mett arbeiðstíðarlinja skal leggjast við innkomna tilboðnum.

**Búskett**

Vit eru opin fyri kreativum loysnum, men vilja fegin at veitarin hevur eitt realistiskt búskett í huganum. Í prísinum skal verða alt tað, sum er lýst undir ”Krøv og uppgávur” punkt 1-7 í útboðnum.

## Sáttmáli og karmar

Ein sáttmáli verður gjørdur við veitara, sum skal bjóða fram navngivin starvsfólk, sum hava neyðugar førleikar, ið okkum tørva, umframt ein samskipara fyri sáttmálatíðarskeiðið.
Tey starvsfólk, sum veitarin, ið vinnur útboðið, setur á hesa uppgávu, skulu sum útgangsstøði ikki skiftast út. Vísir tað seg, at samstarvið við veitaran ella ávíst starvsfólk hjá veitaranum ikki er nøktandi, tilskilar Rúsdrekkasøla Landsins sær rætt til at kunna skifta starvsfólk.
Sáttmálatíðarskeiðið er tá uppgávan byrjar til uppgávan er liðug, sambært krøvunum í útboðnum.

## Krøv til tilboðið

Uppskot og plantekning/ar, sum lúka punkt 1-7 undir ”Krøv og uppgávur”
(tó er ikki neyðugt at framleiða 3D visualiseringar til tilboðið)

Ráðgevar og sniðgevar, skula hava í minnsta lagi 2 ára skjalprógvaða viðkomandi útbúgving (CV skal leggjast við)

Veitari skal leggja við ella vísa til líknandi uppgávir, sum prógva førleikar og royndir frá líknandi uppgávum, seinastu 5 árini.

**Samlaði prísurin, skal tilskilast hesar partar:**

- Uppskot og plantekning/ar og 3D-visualiseringar vm.
- Ráðgeving og samskipan
- Innbúgv
- Ljós
- Skelting/Skíggjar
- Kassar
- Uppsetan og liðugtgerð
- Annað

Við hesum útboði, biðja vit um eina heildarveiting og tí er vandi fyri, at hjá einum annars góðum tilboðið, eru einstakar vørur og tænastur sum ikki eru heilt, sum vit hugsaðu. Rúsdrekkasøla Landsins kann umvegis samráðing við vinnandi veitaran, broyta ella raðfesta ørvísi. Prísur og góðska kann tí broytast ímeðan uppgávan verður gjørd.
Tað kundi verið t.d. ljóskeldur, kassar ella annað, sum Rúsdrekkasølan metir skal raðfestast ørvísi.

## Hvussu verður vektað?

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis:
**Prísur telur 50%**
**Góðska telur 50%**
Tilboðið við lægsta prísi pr. fermetur, fær 50 stig og skal metast x 50. Lægsti prísur í frymlinum er 2.000 kr. pr. fermetur.
Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:

**Prísur dømi**

Tilboð 1: Tilboðið við lægsta prísi pr. fermetur frá veitara er 2.000 kr. hetta gevur =50 stig.
Tilboð 2: Næst lægsta tilboðið er 3.500 kr. pr. fermetur= 2.000 kr. / 3.500 kr. x 50 =29 stig.
Tilboð 3: Trið lægsta tilboðið er 4.000 kr. pr. fermetur = 2.000 kr. / 4.000 kr. x 50 = 25 stig.

**Góðska**

Út frá einari samlaðari meting av førleikum, útbúgving og royndum hjá veitara, verður eitt stigatal á einum skala fra 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal.
Tá dómsnevndin metir um veitaran, verður hugt eftir øllum undir ”Krøv og uppgávur” frá 1-7 í útboðnum. Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, t.e kvørja meting Rúsdrekkasøla Landsins hevur av innkomna tilfarinum.
Besta loysn fær 50 stig.

**Samlað meting**

Tilboð 1: Førleikar 20 stig + prís 50 stig = samlað meting = 70 stig.
Tilboð 2: Førleikar 35 stig + prís 38 stig = samlað meting = 73 stig.
Tilboð 3: Førleikar 50 stig + prís 31stig = samlað meting = 81 stig.
Tann sum fær rammusáttmálan, er treytað av at veitarin hevur flest stig ~~lægsta samlaða prísin og lýkur flest krøv í útboðnum.~~

**Viðmerkingar:**
Meginreglan er, at vit velja tann veitaran, sum hevur lægsta prísin. Men um prísmunurin er lítil (t.d. bara 1-5 stig), og tað verður mett at vera fyrimunur ikki at velja veitaran við lægsta prísinum, kann dómsnevndin avgera at velja annað tilboð. Hetta kann henda, um til dømis annar veitari hevur betur vøru- og tænastuveiting, fleiri royndir við líknandi arbeiði ella aðrir treytir, sum gera samlaðu heildarmetingina av verkætlanini betur.
*Rúsdrekkasøla Landsins kan gera av ongan at velja.*

## Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðarin letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðarin kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka punktini 1-7 í "Krøv og Uppgávur". Útbjóðari kann, aftaná freistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri neyvt at lýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytirnar.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina, herundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## Hentar upplýsingar

Kunnandi fundur verður á skrivstovuni hjá Rúsdrekkasølu Landsins, Skálatrøð 14.
**mikudagin 17. desember 2025 kl.13.00**
Umboð fyri MAP-arkitektar verða við at svara tekniskum spurningum.
Boða frá luttøku á mail **oh@rusan.fo** í seinasta lagi: **týsdagin 16. desember 2025 kl. 13.00**

Spurningar, ið eru settir áðrenn **mikudagin 07.01.2026 kl. 16.00**
verða svaraðir í seinasta lagi **hósudagin 08.01.2026 kl. 16.00**
Spurningar verða svaraðir skrivliga.
Allir spurningar og svar kunnu síggjast dulnevnd á **keypsportal.fo**

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði
Freist **mánadagin 19. jan. 2026 kl. 08.00**
Uppskot við tilboðið skulu sendast til **oh@rusan.fo**

Vit yvurtaka leigumál 1. apríl.

(Tá byrja niðurtøka og klárgering av hølinum.)